# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Fyri 40 árum síðan:

## Nítjan sjúkrasystrar tóku prógv í 1965



Í 1965 tóku hesar 19 sjúkrasystrarnar prógv á Sjúkrasystraskúla Føroya.

Aftara rað f.v.: Hanna Schmidt, Vágur, Gjertrud Brecker, Skúvoy, Poula Poulsen, Tórshavn, Jonhild Borg, Porkeri, Kathrina Olsen, Skála, Emly Heinesen, Klaksvík, Astrid Lützen, Norðradalur, Unna Jacobsen, Sandvík, Sólvá Vang, Kaldbak, Rigmor Hansen, Argir, Fía Svabo, Miðvágur, Marita Petersen, Vágur, og Margretha Joensen, Nólsoy.

Fremra rað f.v.: Nanna Poulsen, Skála, Jónhild Jacobsen, Norðragøta, Odvør Simonsen, Saltangará, Anna Johansson, lærarinna, Ása Klein, Strendur, Marjun Jacobsen, Mykines, og Ruth Poulsen, Vágur.

Havnar leksikon:

## Fyrsti føroyski príslistin og fyrsta gramofonplátan

**Hesaferð hava vit mynd av fyrsta føroyska príslistanum. Talan er um príslistan hjá Conrad Juhlert, sum hevði handilin "Thorshavns Pianomagasin & Musikforretning" í Havn. Hann gav eisini út fyrstu føroysku gramofonplátuna**

Í 1921 komu feðgarnir Conrad og E.F.S. Juhlert til Føroyar, teir vóru danir.

Orsøkin var, at sonurin hevði fingið arbeiði sum postassistentur í Havn.

Í 1923 lata teir upp handilin "Thorshavns Pianomagasin & Musikforretning" í pakkhúsinum, sum Zacharias Heinesen í 1911 lat byggja í Vágsbotni (húsini tey flestu kenna best sum Perlan, har Gunnar Olsen í 1942 læt upp gistingarhús og matstovu. Hann var tann fyrsti sum nýtti navnið Perlan).

Húsini vóru í trimum hæddum, í ovastu hæddini hevði Nyholm Debes maskinverkstað við inngongd frá Bojsensgarði, í miðhæddini var so "Thorshavns Pianomagasin & Musikforretning" við inngongd frá Bryggjubakka, og í kjallarahæddini hevði Zacharias Heinesen goymslu.

Í 1932 keypti Conrad Juhlert húsini hjá H. C. Andreasen í Niels Finsensgøtu (millum manna varð gøtan tá rópt Sanatorievegurin), og flutt handilin tá í hesi húsini í 1933 (har sum Telebúðin er í dag).

Hann var tann fyrsti handilsmaðurin í Føroyum, sum gav út egnan príslista, príslistan "Katalog 1929-1930", sum hann gav út í 1929.

Conrad Juhlert, sum eisini arbeiddi sum ursmiður, optikari og gullsmiður, læt handilin aftur í 1939, tá hann flutti aftur til Danmarkar at búgva.

Vert er at leggja afturat at fyrsta gramofonplátan, sum er útgivin í Føroyum, gav Conrad Juhlert út í 1928. Tað var finska sangkvinnan Signe Liljequist ið sang trý løg á føroyskum: "Flóvin Bænadiktsson", "Árla var um morgunin", og "Rura rura barnið". His Masters Voice í London gjørdu plátuna, ið kostaði 4 krónar at keypa. Plátan var at fáa hjá "Thorshavns Pianomagasin & Musikforretning" og á Tvøroyri hjá D. J. Magnussen, bókahandlara.

Um nakar liggur inni við einum eintaki av hesi gramofonplátuni, verður hann ella hon vinarliga biðin um at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon. Eisini tey sum hava okkurt at viðmerkja í samband við Conrad Juhlert og Thorshavns Pianomagasin & Musikforretning. Birgar hevur telefon: 314647 / 273168.

**Næstu ferð hava vit myndir og nøvnini á konfirmantunum í 1967**

*Mynd: Landsbókasavnið*



Katalog
1929–1930.
Conrad Juhlert,
Thorshavn, Færøerne.
Telefon 104 — Telefon 104
Uhrmager,
Optiker,
Guldsmed
— samt —
THORSHAVNS
Pianomagasin & Musikforretning